## Ferðavinnan eftir hæli




Ittoqqortoormiit.er eitt av teimum best umtóktu ferðavinnumálunum í Grønlandi, men nú bendir alt á, at gestirnir har verða munandi færri í ár enn tey seinastu árini. Masrtin Munck, stjóri í Nanu Travel, sigur við Sermitsiaq, at soleiðis sum útlitini eru nú, verður ferðafólkatalið í ár bara helmingurin av tí, sum tað var í fjør. Fíggjarkreppan er morsøkin. Martin Munck sigur, at í fjør keyptu ferðafólk 600 dagar á hundasleðu, men higartil eru bara 262 hundasleðudagar seldir í ár.

## Feløg á svartalista

Norski oljugrunnurin hevur sett amerikonsku stórfyritøkuna Textron Inc. og kanadisku fyritøkuna Barrick Gold Corp. á svartalista. Tað merkir, at grunnurin vil ikki hava nakað fíggjarligt samband við fyritøkurnar, og orsøkin er sambært grunninum, at tær hava brotið tær siðareglurnar, sum eru galdandi fyri samstarvið millum oljugrunnin og viðskiftafeløg. Fíggjarmálaráðið í Oslo sigur, at Textron Inc. er komið á svartalista, tí fyritøkan ger tyssibumbur, og Barrick er sett á listan, tí fyritøkan heldur ikki ásetingarnar um at verja umhvørvið.

# Íslendskur urguleikari vitjar Føroyar



*íslendski urguleikarin Bjørn Steinar*

KONSERT

Komandi vikuskifti verða urgukonsertir í Fuglafirði og í Vesturkirkjuni í Havn. Tað er íslendski urguleikarin Bjørn Steinar, sum kemur til Føroyar at spæla og hava fyrilestur og skeið við urguleikarum.

Bjørn Steinar hevur síðan 2006 verið organistur í Hallgrimskirkjuni í Reykjavik og er skúlastjóri við Tónskóla Kirkjunnar, har hann eisini undirvísir í orgulspæli. Hann er royndur urguleikari, hevur spælt nógvar konsertir bæði í Íslandi og aðrastaðni. Hann hevur spælt saman við symfoniorkestrum, spælt kamartónleik og fleiri upptøkur fyri útvarp og sjonvarp og á CD, m.a. øll orgulstykkini hjá Páll Ísólfsson.

Á skránni hesar báðar konsertirnar eru verk af Mendelsohn, Páll Ísolfsson og Messiaen. Av Messiaen fer hann at spæla kenda verkið "La Nativité du Seigneur" – Føðing Krists. og v Mendelsohn Sonatur í c-mol.

Í samband við konsertina í Vesturkirkjuni fer Bjørn Steinar at halda fyrilestur um franskan urgutónleik og hann fer at spæla dømir um henda serstaka urgutónleik. Eisini fara urgunæmingar, sum fáa frálæru í urguspæli á Musikkskúlanum, at spæla franskan urgutónleik fyri honum og skeiðluttakarunum.

Konsertin í Fuglafjarðar Kirkju verður leygardagin kl. 16. Í Vesturkirkjuni verður konsertin sunnudag eisini kl.16. Aftaná konsertina verður okkurt til matna til skeiðluttakararnar og síðan verður fyrilestur og skeið frá kl 18 – 20. Øll, við áhuga fyri urgutónleiki, eru vælkomin at tekna seg til skeiðið á tlf. 284001.



# Chase heldur føðingardag á Summar Festivalinum

**Rockbólkurin Chase ger comeback í sambandi við 20 ára føðingardagin, og teir leggja upp til eitt ordans rockbrak á Summar Festivalinum í august**

FESTIVALUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Chase telist millum legendurnar í føroyskum rocktónleiki. Teir vóru millum best umtóktu bólkarnar í Føroyum í fleiri ár, og við rocktónleiki í altjóða flokki livdu teir dreymin á føroyskum palli.

Teir hava givið tvær fløgur út, og sangir sum Fyrstu Ferð, Two Heart, Sjey Míl Frá Hollywood og Niðasta Brúgv eru millum varðarnar, sum standa eftir bólkin.

Í ár fyllir Chase 20 ár, og føðingardagurin skal haldast við rimmar framførslu á Summar Festivalinum.

- Vit hava tosað um tað leingi, men bara soleiðis leystliga. Í ár eru 20 ár liðin, síðani vit byrjaðu at spæla, og vit hava tosað um at gjørt okkurt í hesum sambandi. Tað verður so framførslan á Summar Festivalinum, sigur Edmund Jacobsen, sangari í bólkinum.

- Um tað er eitt veruligt comeback, ja, tað mugu áskoðararnir avgera. Vit fara í hvussu er at gera okkara besta. Vit eru allir sera spentir og fit for fight, og tað verður stuttligt at møtast aftur. Vit hava satt at siga ikki verið saman síðani vit innspældu „Sum Tjóvur á Nátt" í 2001, sigur hann.

### Spæla tað besta

Chase vóru kendir fyri bæði at spæla egnar rocksangir, og fyri at spæla tað besta hjá kendum útlendskum bólkum.

- Á Summar Festivalinum fara vit at spæla tað besta úr kataloginum - mest løg frá báðum fløgunum, men helst eisini okkurt einstakt coverlag, og møguliga okkurt nýtt, sigur Edmund Jacobsen.

*Hvussu kennist tað at fara aftur á pallin?*

- Kann bara svara fyri meg sjálvan. Og mín meining er, at tað kenst sera gott. Eg gleði meg. Havi tosað við hinar, og teir eru eisini sera spentir.

*Er Summar Festivalurin hóskandi til eitt Chase-comeback?*

- Persónliga haldi eg, at Chase riggar best á einum stórum palli, har ið vit kunnu leika í og spæla rokkstjørnir. Tvætl! Lítil ella stórur pallur - tað snýr seg um tónleik. Vit fara bara at gera okkara besta, og lata áskoðararnar døma.

### Fyrst og fremst festivalur

Hevur Chase nakra framtíð uttan hesa comeback-framførsluna?

- Eg tori ikki at siga. Um tað nú gongur ordiliga væl á Summar Festivalinum, so kann tað verða, at vit fara at freistast til okkurt meira. Kennist tað stuttligt og spennandi, so er tað ikki óhugsandi at vit gera okkurt saman í framtíðini. Nú fáa vit at síggja.

Og fyri fyrstu kunnu gomlu fjepparanir fegnast um, at Chase aftur kann upplivast á palli. Og tey yngru kunnu fáa eitt prógv um, at føroyingar sanniliga duga bæði at skriva og spæla rættan rocktónleik.